

Petra Nemcova er nýggja andlitið hjá handilsketuni John Lewis

# Úr Tsunami til fotomodell

27 ára gamla Petra Nemcova er nýggja andlitið hjá er nýggja andlitið hjá stóru bretsku handilsketuni John Lewis, hon skal næstu tíðina vísa fram klæði hjá kendastu merkjunum, ið John Lewis selur í stóru vøruhúsunum í Onglandi og Skotlandi, hetta er ein risa sáttmáli, ið ger Petru til eitt kent andlit í Bretlandi. Fyri tjekkisku Petru Nemcova er hetta eitt stórt lop frá støðuni, ið hon var í fyri hálvum øðrum ári síðan.

Petra Nemcova var ein av teimum, ið yvirlivdi Tsumani flóðalduna í Kyrrahavinum Annan Jóladag 2004. Hon misti sjeikin í vanlukkuni, og var sálarliga hart rakt, skrivar The Independent.

**nud**



Minnie hundurin vinstrumegin smakkaði sær á Patrick Swayze

mynd: Scanpix.dk

# Patrick Swayze bitin av Minnie

Tá sjónleikarin Patrick Swayze fríggjakvøldið var gestur á talkshowinum hjá Sharon Osbourne, var talan um journalistik við biti í. Sharon sat undir hundi sínum Minnie, tá Swayze kom út til samrøðuna. Hundurin sá somikið østur út, at Swayze helt fyri:

- Minnie tú sært út sum, um tú ætlar at bíta høvdið av mær.

Sharon vildi ikki hoyra tilíkt, og greiddi frá at Minnie var ein sera fittur hundur. So Swayze setti seg óttaleystur hjá Sharon og Minnie. Men bert lítil løta gekk, áðrenn Minnie hevði biti Dirty Dancing stjørnuna. Eftir biti viðgekk Sharon, at hundurin ofta hevði biti hana. Swayze tyktist heldur kløkkur, men rýmdi tó ikki, skrivar The Sun.

**nud**



Patrick Swayze sá ikki sørt kløkkur út

mynd: The Sun

# STEPHEN BALDWIN Á X-TREME SPORTS MEETS HALLELUJA TOUR



Stephen Baldwin brúkar nú lív sítt at boða kristna boðskapin

Yngsti Baldwin beiggin Stephen Baldwin er endurføddur sum kristin, og vil nú breiða boðskapin um frelsu gjøgnum Kristus út til fólkið. Hetta verður tó ikki gjørt á heilt vanligan hátt. Baldwin fer nú á eina stóra rundferð við prædikum, skateboardum og BMX súkklum. Trúboðanarferðin verður rópt The Uprising Core Tour. Baldwin sigur við Reuters, at tá Guð kallaði hann til sín, so vildi hann ikki hava Stephen Baldwin at halda uppat við at vera Stephen Balwin, men vildi hava hann at halda uppat við at synda. Tí brúkar Baldwin sína persónligheit og støðu sum filmstjørna, til at boða boðskapin til ung fólk. Hann hevur eisini gjørt eina teknirøð, ið eitur The Spirit Warriors, ið vendir sær til Skateboard ættarliðið við kristna boðskapinum.

**nud**

# DAVE GROHL HELDUR LYFTI TIL MINUARBEIÐARAR

Dave Grohl fer í oktober at spæla tvær konsertir sum einstaklingur í operahúsinum í Sidney, í hesum sambandi hevur hann boðið tveimum tasmanskum minuarbeiðarum á konsertina, og ætlar sær síðani í býin við teimum. Hóast Grohl ikki hevur hitt teir áður, so er hetta eitt fleiri mánaðir gamalt lyfti, ið hann nú heldur.

Todd Russell og Brant Webb vórðu í vár fangaðir undir jørðini, tá minan, ið teir arbeiddu í, rapaði saman. Teir vóru fangaðir í 15 døgn undir jørðini, ígjøgnum eitt hol fingu teir samband við bjargingarfólkið, og bóðu um ein iPod við tónleikinum hjá Foo Fighters, so teir høvdu okkurt at taka sær til, meðan teir bíðaðu. Tá Foo Fighter sangarin Grohl hoyrdi um hetta, bjóðaði hann teimum á konsert við bólkinum. Hann bjóðaði at flúgva teir hvar sum helst í heiminum á Foo Fighters konsert, men teir hava enn ikki tikið av tilboðnum. So nú fer Grohl til teirra, skrivar tv2.dk.



Dave Grohl ætlar sær í býin við Todd Russell og Brant Webb, tá hann er liðugur at spæla fyri teimum

mynd: Scanpix.dk

